# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað er rætt at banna royking í vertshúsum. Uppskotið er eitt týðandi stig rætta vegin (Lars Løkke Rasmussen).*

# Mundu skotið flogfar við 300 ferðafólkum niður

**Tað var í síðstu løtu, at amerikanski flogskiparin gjørdi vart við seg, tí tá vóru fýra ísraelsk jagaraflogfør til reiðar at skjóta flogfar hansara niður.**




Amerikanska Continental Airlines-flogfarið var á veg eystur ímóti ísraelsku strondini, tá eftirlitið á Ben Gurion-flogvøllinum kallaði á tað. Men av einari ella aðrari orsøk svaraði amerikanski flogskiparin ikki..

Flogeftirlitið gjørdi skjótt av og boðaði loftverjuni frá, at eitt flogfar var á veg ímóti landi. At flogfarið ikki svaraði kundi vera tekin um, at yvirgangsmenn høvdu tikið ræðið umborð og ætlaðu at brúka flogfarið í einari atsókn.

Loftverjan bar eisini skjótt at. Fýra jagaraflogfør av sløgunum F15 og F16 vórðu send ímóti ferðamannaflogfarinum, og Ehud Olmert, forsætisráðharri, Amir Perez, verjumálaráðharri, og Gaby Ashkenazy, herovasti, vórðu kunnaðir um, hvat var á vási.

Sambært ísraelskum fjølmiðlum var tað í síðstu løtu, at amerikanski flogskiparin skilti, hvussu álvarssomn støðan var. Tá umhugsaði ísraelska stjórnin, hvat gerast skuldi.

-Vit hava ongantíð verið so nær við at steðga einum ferðamannaflogfari, sigur ein yvirmaður í ísraelsku loftverjuni við blaðið Jerusalem Post í dag.

Amerikanska Boeing 777-flogfarið var á veg úr New York til Tel Aviv við 300 ferðafólkum.

# Fyrrverandi stjórnarleiðari skuldsettur fyri fleiri morð

**Løgreglan í Bangladesh hevur skuldsett Sheikh Hasina, fyrrverandi forsætisráðharra, og skuldsett hana fyri at hava medvirkað til fleiri morð.**

Løgreglan vil vera við, at Sheikh Hasina Wajed og 55 onnur skipaðu fyri, at fimm víðgongd andstøðufólk vórðu myrd undir ófriði í høvuðsstaðnum Dhaka tann 28. oktober í fjør.

Tann 60 ára gamla Sheikh Hasina Wajed var forsætisráðharri í Bangladesh frá 1996 til 2001. Hon er í løtuni á vitjan í USA og er tí ikki tikin enn. Fyrr hevur hon sagt, at tað fer ikki at eydnast núverandi stjórnini í Bangladesh at fáa seg at gevast við tí politiska arbeiðinum.

Forsetin í Bangladesh, Iajuddin Ahmed, lýsti landið í undantaksstøðu tann 11. januar fyri at fáa enda á ófriðinum, sum tá hevði staðið við í fleiri mánaðir. Tá ætlaði forsetin at halda val síðst í januar, men tað varð av ongum.

*Sheikh Hasina Wajed er skuldsett fyri at hava medvirkað til fimm politisk morð.*



## STUTT SAGT

**Miðstøð fyri píning**
Ein nýggj frágreiðing hjá Amnesty International kemur til ta niðurstøðu, at Egyptaland er altjóða miðstøð fyri skipaðari píning. Sagt verður, at onnur lond brúka Egyptaland til at pína fangar, sum skulu avhoyrast sum lið í bardaganum ímóti altjóða yvirgangi. Sambært Reuters hevur egyptiska stjórnin ikki gjørt nakrar viðmerkingar til innihaldið á frágreiðingini hjá Amnesty International. Eygleiðarar siga, at frágreiðingin kemur egyptisku myndugleikunum illa við, tí tað eru bara nakrir fáir dagar, síðani ein egyptiskur løgreglumaður varð avmyndaður, meðan hann bukaði ein fanga.

**Chirac ikki friðaður**
Konservativa forsetavalevnið í Fraklandi, Nicolas Sarkozy, avsannar, at hann skal hava lovað núverandi forsetanum, Jacques Chirac, grið, verður hann valdur. Chirac fer frá í næsta mánað, og roknað verður við, at hann tá verður drigin í rættin fyri lógarbrot, sum hann skal hava framt, meðan hann var borgarstjóri í París. Sum forseti er hann sloppin undan rættarsókn, og eitt franskt blað vildi fyrr í vikuni vera við, at Sarkozy hevur lovað honum grið, verður hann valdur til forseta. Men tað avsannaði Sarkozy í gjár.

**Ótti á Galapagos**
Myndugleikarnir á Galapagos-oyggjunum, sum eru partur av Ekvator, siga nú, at tað ógvuliga sjáldsama djóralívið á oyggjunum er í vanda, og at myndugleikarnir tí hava sett eina serliga endurreisingarskipan í verk. Galapagos-oyggjarnar, sum eru meiri enn 500 fjórðingar úr landi, eru heimskendar fyri sítt sermerkta djóralív, og tað var eisini har, at Charles Darwin fekk hugskotið til sítt ástøði sum menningarlæruna. Myndugleikarnir á oyggjunum siga, at tey nógvu ferðafólkini og ólóglig veiða órógva djóralívið.